# u ginusøgur



*Íslendsku altingskvinnurnar framføra Ginusøgur*



*Hvat man hon siga her?*

upp til Ginusøgur. Tað er ongantíð hent fyrr. Salurin var á tremur og lagið var framúr gott. Í tí partinum av leikinum, sum er syrgiligur, kundi ein hoyra eina nál detta á gólv, og aftaná segði onkur, at tey táraðu í tí syrgiliga partinum.

Hinir partarnir, monologarnir, vóru ómetaliga stuttligir. Tá var láturin so nógvur, at vit noyddust í heilum at steðga á, sum vit flentu. Í partinum har vit tiva ella stuna, kókaði salurin yvir. Tað er ikki hvønn dag vit síggja politikarar kasta allar hemningar í einum so inniligum leikluti. Men vit góvu okkum fyri sakina og tivaðu og stunaðu á allar hugsandi hættir: varisliga, vilt og fúlt. Fantastiskt. Og av tí at móttøkan var so mikil og hjartalig, gav tað okkum eisini dirvi til at leggja alla megi í, og at tulka handritið til fulnar.

*Hvussu bleiv framførslan móttikin av áskoðarum, miðlum og mannligum politikarum?*

– Framførslan varð sera væl móttikin. Lógvabrestirnir vildu ongan enda taka. Nógv meira enn vit høvdu væntað.

Okkurt hendi hetta kvøldið. Tað var ein so innilig upplivilng, sum eg haldi, at øll, sum vóru hjástødd, kendu. Tá vit komu út í forhøllina aftaná, komu fólk, sum vit als ikki kenna, yvir og mussaðu okkum takk fyri. Tað var so positivt.

Og fjølmiðlarnir søgdu, at vit slógu ígjøgnum og í Morgunblaðnum stóð: "Þingkonur slógu í gegn í Píkusögum. Alþingiskonur fluttu leikritið Píkusögur eftir Eve Ensler í Borgarleikhúsinu á V-deginum í gær. V-dagssamtökin voru stofnuð árð 2002 á Íslandi og hafa lagt áherslu á að vinna gegn nauðgunum. María Ellingsen leikstýrði verkinu í gær og var fjáröflun að lokinni sýningu þar sem tekið var við frjálsum framlögum. Flytjendur vöktu mikinn fögnuð í salnum og þóttu sýna ótvíræða leikhæfileika."

Nógvir mannligir politikarar vóru til framførsluna, og nakrir av teimum (umboð fyri hvønn flokk) fingu til uppgávu at reisa seg upp til endans í framførsluni, og siga nakrar setningar og svara spurningum. Eitt nú: Hvussu hevði heimurin verið fyri kvinnur, um eingin harðskapur var? Og teir svaraðu til dømis, at so kundu kvinnurnar sovið tryggar, ella at tær kundu notið kynslívið. Dagin eftir framførsluna takkaðu teir fyri framførsluna og søgdu, at hon var sera góð. Eg haldi, at teir síggja okkum kvinnur við øðrum eygum nú aftaná. Eg haldi, at teir fingu eyguni upp fyri pørtum av kvinnuheiminum, sum teir ikki høvdu hugsað um áður.